# TÍÐINDI

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

*- Hetta er púrasta nýtt fyri mær. Poul Michelsen hevur ongantíð vent sær til mín við málinum viðvíkjandi sendistovu í Reykjavík. Hetta er fyrstu ferð í tey 27 árini, eg havi verið í politikki, at ein tingmaður Fólkafloksins leggur eitt slíkt uppskot fyri tingið uttan at tosa við floksfelagarnar um tað fyrst*

*Anfinn Kallsberg, formaður Fólkafloksins*

# - Poul Michelsen kravdi mín sess í uttanlandsnevndini

**– Eg hoyrdi fyrstu ferð um støðuna hjá Poul Michelsen í flaggmálinum í Sosialinum, sigur Anfinn Kallsberg, sum ongantíð hevur upplivað, at ein fólkafloksmaður legg slíkt mál fyri tingið uttan at tosa við flokkin fyrst**

POLITIKKUR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

- Poul Michelsen hevur ongan nevndarsess mist.

Tað staðfestir Anfinn Kallsberg, formaður í Fólkaflokkinum eftir at Poul Michelsen á Portalinum sunnukvøldið (og í blaðnum í gjár) legði Jørgin Niclasen, formann Fólkafloksins á tingi, undir at lúgva í fimm førum.

- Tað er rætt, at vit hava umrøtt spurningin um at broyta býtið av nevndarsessum. Men hetta er ongantíð staðfest og var í veruleikanum gjørt eftir at Poul Michelsen kravdi at fáa mín sess í uttanlandsnevndini, sigur Anfinn Kalsberg, sum staðfestir, at hetta ynskið – ella krav – hevur Poul Michelsen ikki fingið uppfylt.



*- Vit hava umrøtt málið um at broyta nevndarsessirnar hjá Fólkaflokkinum, men tað var tí, at Poul Michelsen kravdi at fáa mín sess í Uttanlandsnevnd Løgtingsins, sigur Anfinn Kallsberg*

- Men hann hevur so fingið hálvan fót innum, tí hann er vorðin varalimur hjá mær í uttanlandsnevndini, sigur Anfinn Kallsberg.

Men Anfinn Kallsberg skilir ikki, hvussu Poul Michelsen kann fáa tað til eina revsing, at hann hevur mist ein sess, hann ikki hevur fingið, og tí avsannar hann tað, sum Poul Michelsen kallar eina revsing aftur fyri, at hann legði fram málið um sendistovuna í Reykjavík og flaggstríðið.

- Eg má heilt erliga siga, at hetta er púrasta nýtt fyri mær. Poul Michelsen hevur ongantíð vent sær til mín við málinum viðvíkjandi sendistovu í Reykjavík. Eg má eisini staðfesta, at hetta er fyrstu ferð í tey 27 árini, eg havi verið í politikki, at ein tingmaður Fólkafloksins leggur eitt slíkt uppskot fyri tingið uttan at tosa við floksfelagarnar um tað fyrst, sigur Anfinn Kallsberg, sum fyrstu ferð hoyrdi um sjónarmiðini hjá Poul Michelsen, tá hann læs um tað í Sosialinum.

Anfinn Kallsberg leggur dent á, at allir í Fólkaflokkinum eru samdir við Poul Michelsen um flaggspurningin.

- Men hatta er ikki rætti mátin at gera tað uppá – hatta er nýggj kotuma, sum vit ikki hava sæð í Fólkaflokkinum fyrr, sigur Anfinn Kallsberg. Hann sigur, at aðrir fólkfloksmenn sjálvandi eisini kundu hugsað sær at fara í sjálvdrátti viðhvørt við onkrum smámáli, men tað er ein óskrivað lóg, at soleiðis gera man ikki í Fólkaflokkinum, sigur Anfinn Kallsberg.

Formaður Fólkafloksins sigur, at hann ikki ætlar sær í stríð við Poul Michelsen í fjølmiðlunum um hetta mál. Men hann viðgongur, at hetta er drepandi fyri flokkin, men at málið eigur at verða viðgjørt innanveggja í samgonguni.

FVE **FISKIVEIÐIEFTIRLITIÐ**
The Faroe Islands Fisheries Inspection



## LØGFRØÐINGUR TIL FISKIVEIÐIEFTIRLITIÐ

Talan er um eitt nýtt starv. Tann, sum settur verður kemur partvís at arbeiða saman við løgfrøðingunum í Fiskimálaráðnum. Ert tú áhugað/-ur í revsirætti og í fiskivinnu og fiskivinnuumsiting, dugir at arbeiða sjálvstøðugt, og torir at taka avgerðir, ert tú tann rætti til starvi.

Fiskiveiðieftirlitið er skipað sum deild í Fiskimálaráðnum. Á Fiskiveiðieftirlitinum arbeiða í løtuni 62 fólk harav 46 við skipunum Brimli og Tjaldrinum.

**Førleikakrøvini**
Umsøkjarin skal hava lokið prógv sum løgfrøðingur. Tú skal duga væl at samstarva og eisini tora at vera í sjálvdrátti.

**Høvuðsuppgávurnar í starvinum vera**
- At ráðgeva leiðsluni á landi og umborð í skipunum í løgfrøðisligum spurningum, herundir serliga innan revsirættarligar spurningar og tulkingar, innan endurgjaldsrættin og fyrisitingarrrætt
- At fyrireika revsimál, ið skulu leggjast fyri fútan, og møguliga at gera sektaruppskot.
- At gera rundskriv og mannagongdir fyri mál hjá Fiskiveiðieftirlitinum
- At fyrireika lógaruppskot og kunngerðir,
- At viðgera ítøkilig fyrisitingarlig mál

**Setanartreytir**
Lønar- og setanartreytirnar eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Búskapar- og Løgfrøðingarfelag Føroya. Setanarøkið fevnir um Fiskimálaráðið, stovnar undir Fiskimálaráðnum, Løgmanskrivstovuna og onnur stjórnarráð. Tænastustaðurin í løtuni er Fiskiveiðieftirlitið.

Tann, ið settur verður, má tola broytingar í starvinum, og at økið verður umskipa til eisini at fevna um aðrar uppgávur, herundir løgfrøðilig ráðgeving í sambandi við umsiting av fiskiloyvum, avhendingum v.m.

Nærri upplýsingar um starvi kunnu fáast við at ringja til Fiskiveiðieftirlitið tlf. 311065 og tosa við Jóannes Heimistovu, samskipara.

**Umsóknir**
Umsóknir saman við avritum av prógvum og møguligum viðmælum, skulu verða Fiskiveiðieftirlitinum í hendi í seinasta lagi 2. apríl 2007 klokkan 12.00.

**Fiskiveiðieftirlitið**
Heykavegur 6
Postsmoga 347
110 Tórshavn

www.fisk.fo